gult cyan magenta svart

Hvat skal støðið vera í samfelagnum!

Heðin Mortensen
tingmaður
Sambandsfloksins.

Sáttmálasamráðingarnar á arbeiðsmarknaðinum eru byrjaðar, og vit hava longu verið vitni til sama skilið sum fyri tveimum árum síðani. Tað kemst ongan veg. 1. mars fara teir flestu sáttmálarnir úr gildi, og eina viku seinni, ella har á leið, so verður alt samfelagið lagt lamið av verkføllum.

Størsta skommin er vaktar- og bjargingarskipið Brimil, sum í hálvanfimta mánað hevur ligið svínabundin við bryggju í Noreg.

Samgongan hevur ígjøgnum tingið sett sær fyri at loysa ta ósemjuna, hóast øll onnur meta eitt slíkt mál sum eitt mál ímillum fakfeløg og avvarandi myndugleikar.

Tað sum fær meg at skriva hettar, er ein partur av viðmerkingunum í uppskotinum sum Kartin Hansen, landsstýrismaður legði fyri løgtingið, um at loysa trætuna um Brimil.

Miðskeiðis á síðu 3 í viðmerkingunum stendur: ”Eisini vísa feløgini á lønarlagið í t.d. Noregi og Danmark”. Har skoytir Fíggjarmálastýrið uppí: ”Hetta er tó ikki nakað serstakt fyri manning á vaktarskipum. Næstan allir starvsbólkar kunnu vísa á, at lønin í hesum londum er hægri fyri sama arbeiði”.

Hetta er rættuliga áhugavert. Tí í Føroyum hava vit ongantíð gjørt okkum greitt, hvat støði skal vera.

Vit staðfesta, at støðið er øðrvísi í øðrum londum – sum oftast hægri og betri, men meir hendir ikki.

Nú sáttmálasamráðingar eru, og nógv bendir á, at ósemjan er størri, enn fyri tveimum árum síðani, so áttu vit í løgtinginum at havt eitt aðalorðaskifti um støði í samfelagnum.

Skal føroyska samfelagið vera eitt gott og framkomið samfelag at búgva í, ella skulu Føroyar enda sum Albania ímillum norðurlond.

Dømini eru fleiri seinastu tíðina. Samgongan gav ein lítlan skattalætta frá 1. januar. Samstundis varð frádrátturin fyri rentur á sethúsalánum lækkaður úr 48 niður í 44 prosent. Fyri tey flestu var úrslitið fleiri útreiðslur.

Í fjør hækkaði rentan, men í fíggjarlógaruppskotinum ”bagatelliserar” Fíggjarmálastýrið hækkingina. Har stendur at slík hækking hevur ongan týdning, tí afturgjaldstíðin av lánum verður longd?????. Slík støða hjá samgonguni sum heild, er undir alt mark. Tað er beinleiðis ein háðan ímóti fólkinum.

Verandi samgonga hevur sitið við valdinum í 3 ár, og eitt ár er eftir til løgtingsval.

Higartil er stórt sæð einki hent. Alt samfelagið er í bíðustøðu, eftir hvat hendir í fullveldismálinum.

Og sum danska orðatakið sigur: ”hensigten helliger midlet”, soleiðis verður føroyska samfelagið rikið.

Eg veit ikki hvussu leingi fólk vilja bíða eftir nøkrum ítøkiligum, sum kann bøta um gerandisdagin.

Men tað hevði verið eitt huskot at lagt fullveldisætlanina til síðis eitt skifti, og tikið eitt aðalorðaskifti í løgtinginum um hvat støðið í samfelagnum skal vera.

VIÐMERKINGAR

Tjóðveldisflokkurin hevur fingið alla sína skiftistíð

(svar til Marna Tyril)

Helgi Abrahamsen

At nýta myndatalu, kann vera gott, tá tú vilt hava fólk at skilja nakað, sum annars kann vera torskilt.

Men tíverri eru tað altíð nøkur, sum læsa seg so føst í myndaevnið, at tey hava ilt við at skilja ímillum, hvat er mynd og hvat er veruleiki.

Herfyri hevði eg eina grein í bløðunum, har ríkisfelagsskapurin millum Føroyar og Danmark var samanborin við eitt hjúnalag, meðan loysingin var hjúnarskilnaður.

Í Sosialinum tann 17. februar, ger Marni Tyril nakrar viðmerkingar til greinina.

Í viðgongd og mótgongd

Eg byrjaði mína grein við at nevna, at í “hjúnalagnum” millum Føroyar og Danmark, hevði tað bæði gingið við, og gingið ímóti. Við hesum vildi eg vísa á, at ríkisfelagsskapurin ígjøgnum farnu 600 árini, hevur ikki altíð verið so góður, sum hann er í dag. Tó vil eg halda fast við, at hann í dag hevur ovurstóran týdning fyri okkara land og fólk.

Marni Tyril byrjar sínar viðmerkingar, við at fara 600 ár aftur í tíðina, og sigur, at føroyingar tá ongan avgerðarrætt høvdu. Hann tosar um, at “maðurin” alla tíðina hevur verið kúgaður av “konuni” o.s.fr. Ja, hann fer enntá so langt í myndaevninum, at hann ger eitt roknistykki yvir, hvat 600 ár svara til í einum vanligum hjúnalagi millum konu og mann (um eg havi skilt hann rætt). Úrslitið av roknistykkinum er, at 12 ára skiftistíð í veruleikanum svarar til 1 ár. Og júst her haldi eg, at tað hevur týdning at skilja ímillum mynd og veruleika. 12 ár eru 12 ár, líkamikið hvussu Marni Tyril roknar!

Ikki ósamdir um alt

Eg eri als ikki ósamdur við Marna um, at nógv av tí sum hendi afturí í miðøldini átti at verið gjørt ørvísi. Men tað fær meg ikki til at atkvøða fyri loysing í 2001.

Eg eri ikki samdur, tá Marni sigur, at “maðurin” (Føroyar) alla tíðina hevur verið kúgaður. Fyri 600 árum síðani var mentanin munandi ørvísi, enn hon er í dag, og sæð við nútíðareygum, kúgaði yvirstattin síni egnu fátæku. – Hetta varð heldur ikki ókent fyribrigdi, millum føroyingar í Føroyum.

Tí er tað ikki rætt at draga hesa fornu avskeplaðu mentan inn í spurningin um ríkisrættarligu støðuna á okkara døgum. Spurningurin er, hvussu vit hava tað í ríkisfelagsskapinum í dag, og hvat er best fyri okkara framtíð.

Ynskið varð eftirlíkað

Tvær vikur áðrenn seinasta løgtingsval, skrivaði Høgni Hoydal í Dimmalætting, at um Føroyar loystu frá Danmark við 6 – 8 ára skiftistíð, so fór vælferðin hjá vanliga føroyinginum ikki at minka.

Um vit rokna 6 – 8 ár frá 1998, so enda vit onkunstaðni millum árini 2004 og 2006.

Danska stjórnin sigur, at blokkstuðulin skal minkast burtur í 4 stigum (við 20% um árið). Um henda gongdin byrjar 1. januar 2002, ja so endar eisini hon í 2006.

Tað vil siga, at Tjóðveldisflokkurin hevur fingið alt tað, sum hann áðrenn valið segði seg hava brúk fyri.

Kortini kallar Marni Tyril hetta fyri at taka beinini undan “manninum” búskaparliga. Hann heldur “konuna” vera órímuliga, og hann vil fegin hava, at føroyingar varðveita síni rættindi í tí landinum, sum sambært honum sjálvum hevur kúgað okkum í 600 ár.

Lat meg tó enda hesa greinina við at minna bæði Marna Tyril, og onnur loysingarfólk á, at okkum nýtist ikki at kjakast so nógv um treytirnar fyri hjúnarskilnaði, tí sambært seinastu veljarakanningini, so ynskir maðurin (ein stórur meiriluti av Føroya fólki) als ikki at skiljast frá Danmark.

Nú er nokk

TÍÐINDASKRIV
Ung Tjóðveldi

Fólkafundur verður á Vaglinum í Tórshavn leygardagin 3. mars 2001 kl. 15

Í samband við at fólkaatkvøðan um framtíðarstøðu Føroya er avlýst skipar Unga Tjóðveldið fyri fólkafundi undir heitinum ”Nú er nokk !”.

Í 1946 tók Føroya fólk ta avgerð, at Føroyar skuldu gerast eitt sjálvstøðugt land. Sum kunnugt varð henda avgerð ongantíð viðurkend. Alt síðan hetta er nógv tíð og orka nýtt til politiskt stríð um sjálvstýrisspurningin.

Ikki fyrr enn eftir løgtingsvalið 1998 varð landsstýri aftur skipað, ið hevði til endamáls at skipa Føroyar sum fullveldisríki. Samgonguskjal landsstýrisins sigur m.a.: ”at føroyingar eru tjóð og Føroyar eitt land, og at politikkur samgongunnar verður at fremja henda suverenitet í verki”.

Eftir drúgvar samráðingar við donsku stjórnina, ið endaðu úrslitaleysar, varð farið undir at orða eina nýggja fullveldisætlan á heysti 2000.

1. februar 2001 boðaði eitt samt landsstýri frá, at fólkaatkvøða fór at verða útskrivað, har Føroya fólk skuldu avgera framtíðarstøðu Føroya.

Fólkaatkvøðan, ið varð lýst at verða 26. mai, skuldi snúgva seg um, at Føroyar skuldu gerast búskaparliga- og umsitingarliga sjálvberandi og óheftar eftir í mesta lagi 12 árum.

Hóttanir frá donsku stjórnini og ein einstøk veljarakanning hava síðan borið við sær, at fólkaatkvøðan er avlýst og harvið er avgerðarrættinum tikin frá Føroya fólki.

Hesum vil Unga Tjóðveldið harðliga mótmæla og skipað verður tískil fyri fólkafundi har vónin er at fáa savnað allir føroyingar, ið somuleiðis ynskja at staðfesta, at ’nú er nokk !’ á Vaglinum í Tórshavn leygardagin kl. 15.

Mótmælt verður, at:

- avtalan og lyftið, sum eru staðfest í samgonguskjalinum, um at skipa Føroyar sum fullveldisríki verða brotin.
- fólkaatkvøðan, ið er lýst at verða 26. mai, verður av ongum og at avgerðarrætturin harvið verður tikin frá Føroya fólki.
- danska stjórnin blandar seg í innanhýsis politisk viðurskifti og danska stjórnin harvið – heldur enn føroyska landsstýrið – hevur fingið loyvið at tulka og harvið at áseta, hvat ein fólkaatkvøða um framtíðarstøðu Føroya skal snúgva seg um.

Á skránni verða røður, undirhald og felagssangur. Skráin verður lýst nærri fríggjadagin.

Hevur tú ráð, »ikki« at verða við?

Aage Hempel – ABB - AKVA-TRADE - Alto Danmark - Alsam - Atlantic Shipping - Awi - Boats - Bátatænastan - Baader - Betten Maskinstasjon - BFG - Blue Water - Shipping - Bureau Veritas - Båtutrustningen - Columbus Trading - Cosmos Trawl - Com Data - Danish Export Group Association - D.Steven & Son - Duusgaard, Hirtshals - Elling & Eising - El-Service - El-Talvuvirkið - Erhversråden Hirtshals - Estra Prent P/F - ES-Travl A/S - EWOS - Faroe Seafoods - Heilsøla - Faroe Ship - Feedin - Fiskeindustri - Fiskeriforlaget - Fiskeriskolen - Forlaget Fiskeribladet - Forsvaret - Frøkjen, Hirtshals - Fiskeriflåden - Fiskeriministeriet - Fiskerimuseet - Fiskerinytt - Fjordkraft - Forsvarsmuseet - Foroya Fiskasalur - Foroya Fiskimjøl - Foroya Fiskimjøl - Foroya Fiskimjøl